## Lama Sea hitar upp fyri Carpark North

Tá kendi danski rokkbólkurin Carpark North vitja Mentanarhúsið í Fuglafirði, verður upphitingin í serflokki. Ein av bestu livebólkunum í landinum, Føroya glaðasti bólkur Lama Sea skal hita upp. Lama Sea gjørdu veruliga vart við seg í Prix Føroyum í ár, tá teir spældu seg í hálvfinaluna.

Í summar hava teir spælt á MjúS, G! og Ólavsøkukonsertini, og ymsar aðrar konsertir. Teirra ófatiliga orka og jaliga útstráling fangar fólk, og konsertirnar eru tí altíð stórar tónleikaligar upplivingar.

Konsertin við Carpark North og Lama Sea verður 24. september. Atgongumerki fáast í 3´aranum og Shell við Ringvegin í Havn, Hjá Bassa í Fuglafirði, Shell í Gøtudali, Trend Floor í Saltangará, Leikalund í Klaksvík, Statoilstøðini í Sørvági og Statoilstøðini á Tvøroyri

**nud**

# Ungdómsstevna í Sørvági

**Ung í Sørvági, ungdómslistastevna 9. og 10. september: Fýra verksmiðjur, listaframsýning og høvi at vitja**



TÍÐINDASKRIV FRÁ UNGUM Í FØROYUM

Nú freistin er úti at melda seg til Ung í Føroyum Vestur í Sørvágs skúla, gleða fyriskipararnar seg at taka ímóti luttakarunum næsta vikuskifti.

Felagskommunan í Vágum, sum stendur fyri tiltakinum í samstarvi við Norðurlandahúsið, hevur gjørt alt fyri at tryggja, at luttakararnar fáa bestu umstøðurnar. Tveir verksmiðjuleiðarar, Jóna Thomsen og Áslaug Jónsdóttir, búgva uttanlanda, og koma til Føroyar serliga til hetta høvi. Vágoyggin eru umboðað av Sámali Ravnsfjall og Katrini Jørgensen. Mikkjal Helmsdal undirvísir í sjónleiki. Allir verksmiðjuleiðarar eru yrkislistafólk.

Fríggjakvøldið kl. 16 hittast luttakararnir, og flestu teirra sýna tá fyri hinum stevnuluttakarunum eitthvørt, sum tey hava fyrireika sjálvi: m.a. dans, floytuspæl, klaver og sang, - enntá ein stuttfilmur er á skránni. Ein listaframsýning kemur eisini upp fyrsta kvøldið. Allan leygardagin arbeiða tey ungu síðani saman við verksmiðjuleiðarunum. Sama kvøldið millum kl. 18 og 19 kunnu øll áhugaði vitja verksmiðjurnar og fregnast eitt sindur um, hvussu arbeiðið fer fram.

Vikuna eftir, t.e. 12. - 17. september, verður framsýningin at síggja í hølunum hjá Føroya Banka í Sørvági. Myndlistaverk og bøkurnar, sum verða skaptar í verksmiðjuni "Mynd & orð, bókin sum listaverk", verða sýnd.

Ætlanin er, frá nú av, at halda smærri Ung í Føroyum-stevnur ymsastaðni í landinum støk ár, meðan stevnan í Norðurlandahúsinum heldur fram makað ár. Hetta er bæði fyri at fáa fleiri samstarvspartar, og at tryggja sær, at hetta ikki verður til eitt høvuðsstaðartiltak burturav. Í tilmeldingunum hesaferð er lutfallið av ungum av bygd munandi størri - meðan ein stórur bólkur eisini eru tey, sum hava verið til líknandi tiltøk fyrr, og hava glett seg til at koma aftur.

Sum vanligt, eru tað tey ungu millum 13 og 18 ár, sum eiga stevnuna. Tó eru nøkur, sum eru fylt 19, við á stevnuni. Hesi hava valt at halda fram sum ungir fyriskiparar, ella "stórasystkin", sum tey verða nevnd. Tey verða frásøgufólk á sýningina fríggjakvøldið og taka sær av ymsum praktiskum arbeiði á stevnuni og hjálpa eisini til sum tíðindafólk.

## Upptøkurnar ganga væl

Gestir heva seinastu vikuna verið í Lundgaard upptøkuhølunum í Vejen í Jútlandi. Teir lata væl at, og siga at upptøkurnar ganga betur enn væntað, teir hava longu tikið upp umleið helvtina av tilfarinum, ið verður á fyrstu fløguni hjá bólkinum.

Veðrið er gott, og umstøðurnar í upptøkuhølunum eru frálíkar, tó siga teir seg verða eitt sindur irriteraðar av øllum teimum insektunum, sum plága teir orsakað av góða veðrinum.

**nud**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 36, 2005
www.kaupthing.fo

# Katrina ávirkar fíggjarmarknaðirnar

MARKNAÐARRÁK

Ódnin Katrina hongur enn sum eitt ok yvir fíggjamarknaðunum. Serliga hevur hon fingið oljuprísin at hækka. Trý oljureinsiverk í suðurstatunum í USA eru rakt av yvirflóð orsakað av ódnini, og tað minkar samlaða útboðið á heimsmarknaðinum við 2%. Tað er ikki so nógv, men tá framleiðslan longu koyrir undir høgum trýsti, gera øll avbrot mun, og tey trýsta prísin upp. Í USA fekk ódnin 1-mánaða framtíðarprísin á bensini at hækka heili 40%, og tað elvdi til ótta fyri, at privati brúkarin ikki fer at hava nógv at nýta til aðrar vørur. Hetta hevði minkað um búskaparvøksturin. Prísurin er tó longu lækkaður 15% aftur. Vanliga plaga ódnir o.t. ikki at ávirka marknaðirnar í langa tíð. Marknaðirnir eru tó ikki á einum máli viðvíkjandi Katrinu. Tað er orsakað av, at tað tekur langa tíð at fáa oljureinsiverkini at framleiða aftur, umframt at eitt stórt øki enn er undir í vatni.

### Lánsbrævarentur sett nýtt met

Lánsbrøvini tóku dik á seg í farnu viku í kjalarvørrinum á ódnini Katrinu. 10-ára danska rentan kom niður á 3,00%, og tað er nýtt met. Um so verður, at hon fer niður um hetta markið, kann hon væntast at lækka 0,25% aftrat.

### Partabrøv sýnast bílig

Tá lánsbrævarenturnar eru lágar, sýnast partabrøv bílig. Orsøkin er, at íleggjarar vanliga síggja lánsbrøv og partabrøv sum íløgur, ið kappast móti hvørjari aðrari. Tá lánsbrævarenturnar eru lágar, gerst væntaði vinningurin av hesum lágur og væntaði vinningurin á partabrøvunum gerst tí lutfalsliga høgur. Tískil sýnast partabrøvini bílig í slíkari støðu. Hetta er ein orsøk til at partabrøv hava staðið seg væl seinastu vikuna og útlitini fyri at partabrøv eisini gerast góð íløga í næstum, eru tí hampuliga góð.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna koma ikki tey heilt stóru lyklatølini. Tað koma metingar um búskapin í USA frá tjóðbankanum, og í Evropa frá OECD. Soleiðis er líkt til, at oljuprísurin eisini fer at merkja hesa vikuna á virðisbrævamarknaðunum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 595,04 | -2,0% | ↓ |
| JPY | 5,42 | -1,7% | ↓ |
| GBP | 1.095,85 | 0,3% | ↑ |
| NOK | 95,68 | 1,9% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,89 | 0,3% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 176,83 | 0,5% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 99,26 | 2,3% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 65,26 | -0,4% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*